# Thorshøvdi klárur



Norska skipasmiðjan Fiskerstrand Verft og litavska skipasmiðjan Western Shipyard eru nú lidnar at umbyggja verksmiðjutrolaran "Thorshøvdi", sum skal í Suðurhøv at royna eftir krill. Skipið, sum er 10 ára gamalt og 133 metrar langt, var upprunaliga farmaskip. Umbyggingin hevur tikið longri tíð enn ætlað og er eisini vorðin dýrari enn ætlað, so í dag stendur skipið eigarunum í 860 milliónum norskum krónum, skrivar Sunnmørsposten. Ein talsmaður fyri norska reiðaríið sigur við blaðið, at umbyggingin hevur drigið út og er dýrkað, tí eigararnir vildu hava tað besta fyri peningin.

# Seks nýggir kommunulæknar

Nú verður av álvara sett ferð á útbúgving av kommunulæknum í Føroyum. Tað sigur Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum.Økta játtanina á figgjarlógini fyri 2010 merkir, at heili seks yngri læknar kunnu koma í útbúgving til kommunulækna komandi ár. Tað er eingin loyna, at kommunulæknaskipanin er undir trýsti og kemur undir enn størri trýst framyvir. Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum, hevur tí raðfest at fáa til vega 500.000 krónur eyka soleiðis, at fleiri yngri læknar kunnu koma í útbúgving til kommunulæknar. Við øktu játtanini kunnu tvey introduktiónsstørv og eitt útbúgvingarstarv á almen medisin setast í vár. Seinni í heyst verða tvey útbúgvingarstørv og eitt introduktiónsstarv sett afturat.

# Krevja 9,2 milliónir í endurgjaldi frá fiskimálaráðnum

**KAPPINGAR-AVLAGING**

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Menninir aftanfyri Sjóvinnudepilin í Havn, CMM, hava nú gjørt av at stevna Fiskimálaráðnum við kravi um 9,2 milliónir í endurgjaldi.

Tað gera teir Lassi Borðoy og Sjúrður Guðjónson púra greitt, nú samgongan hevur givið trygdarmiðstøðini í Klaksvík eina eykajáttan upp á 9 milliónir krónur og eisini hevur givið henni rakstrarjáttan á figgjarlógini fyri næsta ár.

Teir staðfesta, at hóast teir eru teir einastu, sum verða ávirkaðir av hesi eykajáttan, eru teir ikki hoyrdir í málinum og ei heldur vórðu teir kallaðir til fund í figgjarnevndini at føra síni sjónarmið fram.

Teir vísa á, at fyrr í ár kom kappingarráðið til ta niðurstøðu at Fiskimálaráðið brýtur kappingarlógina um ráðandi støðu á marknaðinum, tá ið tað játta trygdarmiðstøðini í Klaksvík pening.

– Vit meta tí, at henda játtan, og eisini játtanin fyri 2010 til rakstur og íløgur, eru grovt brot á hesa avgerð. Tað sær ikki serliga gott út í einum demokratiskum landi, tá lóggevandi valdið ikki yvirheldur egnu lógir, siga Lassi Borðoy og Sjúrður Guðjónsson.

Teir staðfesta, at hetta málið hevur gjørt tað, at lánveitari teirra hevur sagt upp øll lán, soleiðis at virkið, av landsins myndugleikum, er tvingað at lata aftur, sum teir málbera seg í skrivi til figgjarnevndina hjá Løgtinginum í sambandi.

– Okkara virkið skuldi annars vera eitt nýskapandi virkið innan sjóvinnuna og skuldi skapa avleitt virksemi í samband við FAS-skipanina.



*Trygdarmiðstøðin í Klaksvík hevur fingið almennan stuðul til at knúsa ein privatan kappingarneyta, siga menninir aftanfyri Sjóvinnudepilin í Havn, sum nú má snara lykilin*

**Internetsamskipari til Smyril Line**

**WWW. SMYRIL-LINE .KOM!**



Vilt tú vera við at marknaðarføra Smyril Line á netinum og at samskifta online við málbólkin hjá okkum í Føroyum, Danmark, Týsklandi og aðrastaðni í Evropa, so hava vit eitt sera spennandi starv til tín.

Vit leita eftir einum starvsfólki, sum skilir týdningin av online-samskifti, og sum kann gera Smyril Line sjónligt fyri umheiminum á internetinum. Vit leita eftir einum starvsfólki, sum hevur dirvi og vilja, og sum skilir týdningin av online-marknaðarføring.

Vit bjóða tær eitt spennandi fulltíðarstarv í einari vaksandi fyritøku, sum heldur til í Tórshavn, Keypmannahavn, Hanstolm og Kiel.

Størsta ábyrgdarøkið verður at samskipa samskiftið á netinum, syrgja fyri at Smyril Line verður sjónligt, har tað er neyðugt, millum annað á Google og øðrum leitimaskinum, skriva tekstir, viðlíkahalda heimasíður og annað.

**HØVUÐSUPPGÁVUR:**
– Styrkja Smyril Line á online-økinum
– Samskipa aktivitetir í sambandi við dagføringar o.a. á heimasíðunum
– Skriva tíðindi til heimasíðurnar
– Dagføra tekstir og myndir
– Syrgja fyri, at øll produkt eru at finna
– Syrgja fyri, at alt sær gott út
– Supportera allar skrivstovur á samskiftisøkinum

**VIT VÆNTA, AT TÚ:**
– Arbeiðir skipað og sjálvstøðugt
– Hevur royndir á økinum
– Hevur viðkomandi útbúgving
– Dugir væl at samskifta við starvsfelagaðar og onnur
– Dugir at orða teg í minsta lagi á føroyskum, donskum og enskum, bæði í skrift og talu
– Hevur royndir við CMS-skipanum

*Hevur tú spurningar um starvið, ert tú altíð vælkomin at seta teg í samband við marknaðarstjóran, Henny á Líknargøtu, á +298 551511 ella á henny@smyril-line.fo.*

*Starvið skal setast skjótast til ber, so um hetta hevur tín áhuga, verður tú vinarliga biðin um sum skjótast at senda okkum tína umsókn við teldubrævi til henny@smyril-line.fo ella við vanligum brævi til:*

Smyril Line
Yviri við Strond 1
Postboks 370
FO 110 Tórshavn

SMYRIL LINE – EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

SENDISTOVAN